# Oljuleiting á Atlantsmóti

**Sær ljósari út hinumegin markið**

OLJULEITING
*Jan Müller*



Hóast tøgn hevur valdað leingi á Atlantsmótinum, so er okkurt, sum bendir á, at ljósglottar eru í leitingini eftir kolvetni, í hvussu er vestan fyri Hetland og heilt upp at føroyska markinum. Eitt oljusamtak við Amerada Hess, ChevronTexaco, Dong og OMV er júst liðugt við ein avmarkingar- og leitingarbrunn skamt frá føroyska markinum, í tí fundinum, sum varð gjørt fyri góðum ári síðani og sum nevnist CAMBO. Tað er ómetaliga torført at fáa nakrar upplýsingar yvirhøvur um úrslitið av hesum sera spennandi og áhugaverda brunninum, men okkurt kundi bent á, at talan er um eina gevandi boring og positiva boring. Fyristøðufelagið hevur tó onga viðmerking til nýggja brunnin.

Men um so er, at seinasta boringin staðfestir tað, sum feløgini longu hava vitað, nevniliga at talan er allarhelst um eitt lønandi fund, so kann hetta fáa stóran týdning fyri leitingina sum heild á Atlantsmótinum. Hetta ikki minst tí at talan her er um eitt nýtt slag av "play" modelli. Tvs. at oljufeløgini her brúka eitt heilt annað arbeiðsmodell enn talan var um longur syðri, eitt nú í Gullhorninum. Cambofeltið, sum nú er vorðið betri kannað, kann, um talan veruliga er um eitt stórt og lønandi fund, hvat mangt kundi bent á, fáa veruliga gongd á aftur leiting á Atlantsmótinum og hvat er mest týdningarmikið, tað kann birta nýggjar vónir hjá oljufeløgunum og myndugleikunum. Um Cambo veruliga er eitt stórt lønandi oljufelt, og tað verður bygt út, so merkir hetta oljuframleiðslu beint við føroyska markið og tað í einum øki, sum feløgini meta líkist nógv teigunum, sum føroyingar fara at luta út í 2. rundu. Men vit skulu heldur ikki gloyma, at hetta liggur rættiliga tætt upp at 9 ára loyvinum hjá Agip (ENI) og Føroya Kolvetni.

Lata vit Cambobrunnið liggja fyri fyrst, so er eisini talan um eina áhugaverda borgin longur eystari. Laggan gassfundið, sum varð gjørt fyri nøkrum árum síðani, tykist nú aftur at vera sera áhugavert. Ein nýggjur brunnur er júst boraður í hesum feltinum og sambart keldum í oljuheiminum, eitt nú oljubladnum Uppstream, so skal boringin vera væleydnað og kann møguliga enda við fyrstu útbygging av gassfelti vestan fyri Hetland. Hetta eru sera góð tíðindi fyri oljufeløgini, sum eru við og fylgja við tilgongdini á Atlantsmótinum. Tað er Total, sum er fyristøðufelag og verður talan um útbygging, hvat okkurt longu nú kundi bent á, so verður rørleiðing løgd inn til Hetlands og víðari higani til Skotlands.

Men áhugaverdu tíðindini um Atlantmótið eru ikki liðug við Cambo og Laggan. Í løtuni borar West Navigator brunn fyri ChevronTexaco, Statoil, Dong og OMV longur norðuri og skamt frá markinum. Sum skilst kunnu fyrstu úrslitini av hesi boringini koma longu í næstu viku. Men eisini her er talan um "tight hole status", so ivasamt er um nakað kemur út.

Og um ein mánað ella so fer BG saman við eitt nú Atlants Kolvetni at bora brunnin Bedlington heilt har suðuri við markið.

So hóast lítið og einki virksemi er á landgrunninum við undantaki av seismiskum kanningum, so kann nógva virksemið beint hinumegin markið og góð úrslit hagani fáa alstóran týdning fyri leiting á landgrunninum í framtíðini.

Tað er greitt, at almennir upplýsingar um fund á bretskum øki nær markinum kunnu fáa sera positiva ávirkan á eina komandi rundu her hjá okkum og eisini fyri 22. runduna á bretskum øki. Men nógv bendir á, at oljufeløgini, um tey gera fund, vilja halda kortini tætt at sær, tí tað kann vera ein fyrimunir fyri tey, tá bjóðast skal uppá nýggjar teigar báðumegin markið. Men Laggan boringin, hóast hon liggur nakað longur eystari á bretskum øki, kann tó skunda undir menning av gassframleiðslu, sum aftur kann gagna okkum uppá longri sikt, og er talan um staðfesting av Cambofundinum sum eitt veruligt lønandi oljufund, so vil eisini tað fáa ikki minst stóru oljufeløgini at tevja kolvetni í føroysku undirgrundini eisini.






# TV2 rættar einki

**– Vit hava ikki gjørt nakran feil, og tískil hava vit heldur einki at rætta, sigur Lotte Mejlhede, undirstjóri á TV2 tíðindadeildini**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Óli Jacobsen hevur fingið aftursvar frá TV2, har biðið verður um, hvat ítøkiligt klagað verður um. TV2 heldur seg ikki hava gjørt nakað skeivt*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Málið viðvíkjandi innslagnum hjá TV2 um danskar og føroyskar fiskimenn og inntøkur er aftur dottið av skíggjanum, og eftirspælið verður eftir øllum at døma ikki tað nógva.

Alt byrjaði við at TV2 sendi eitt innslag við boðskapinum, at føroyskir fiskimenn forvinna í miðal 664.000 krónur eftir skatt. Tað vísti seg seinni, at TV2 sipaði til tøl fyri nótaskip í 2001. Hetta skapti øsing í Føroyum ikki minst tí í sama viðfangi úttalaði Christian Thulesen Dahl, formaður fyri fíggjarnevndina í Fólkatinginum, at ein tílík støða gjørdi tað neyðugt at seta blokkstuðulin til Føroya ovast á politisku dagsskránna.

Men TV2 ætlar sær ikki at rætta nakað.

– Vit hava ikki gjørt nakran feil, og tískil hava vit heldur einki at rætta, sigur Lotte Mejlhede, undirstjóri á TV2 tíðindadeildini.

Men Lotte Mejlhede sigur seg harmast um, at hendan støðan hevur tikið seg upp. Hon sigur seg hava virðing fyri, at málið hevur munandi størri áhuga og týdning fyri Føroyar enn fyri Danmark og danir.

– Í bakljósinum kunnu vit siga, at vit áttu at verið meira nágreinilig og sagt, at vit samanbóru tey fiskimenn, ið vinna mest í Føroyum og í Danmark, sigur Lotte Mejlhede.

Spurd um hon heldur, at hyggjararnir sita eftir við einari rættvísari mynd, tá fiskimenn við nótaskipum mynda seks prosent av samlaða manningartalinum við størru føroysku skipunum?

– Tað kann vera, at tey, sum ikki hava lurtað nóg væl eftir gera tað, men eg haldi innslagið vera í lagi, og vit siga einki skeivt, sigur Lotte Mejlhede.

## Viðgera klagu

Formaðurin fyri Føroya fiskimannafelag, Óli Jacobsen, sendi fyrr í vikuni donsku sjónvarpsrásini eina klagu um innslagið.

Lotte Mejlhede sigur, at klagan nú verður viðgjørt eftir teimum vanligu mannagongdunum. Men fyrst sleppur Óli Jacobsen at útgreina sína klagu nærri.

– Vit hava skrivað aftur og biðið um at fáa nágreiniliga at vita, hvat klagað verður um, sigur Lotte Mejlhede.

Klagan verður í fyrsta viðfangi viðgjørd hjá henni sjálvari. Hon hevði ábyrgdina av tíðindafluttninginum hetta kvøldið, innslagið varð sent.

Millum Fiskimannafelagið og TV2 stendur nú orð móti orði. Fiskimannafelagið heldur fast við, at teir ikki hava havt samband við TV2 og útvega teimum nøkur, men TV2 sigur seg hava fingið leiðbeiningar frá Fiskimannafelagið um at finna tey neyðugu tølini á heimasíðuni hjá Fiskimannafelagnum.

# 982 útlendingar í Føroyum

**Talið omanfyri av ikki donskum ríkisborgarum í 2003 kann finnast í almenna hagtalsverkinum fyri Føroyar, sum er útkomið við feskum tølum**

HAGTØL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

330 blaðsíður við talvum, tølum og yvirlit yvir øll hugsandi og óhugsandi viðurskifti eru at finna í nýggjastu árbókini fyri Føroyar. Hon hevur tøl fram til 2003 og kallast árbókin fyri 2004.

Umframt at vera hent hjá fjølmiðlum í agurkatíðini, siga útgevararnir eisini, at bókin kemur væl við hjá almenninginum og ikki minst til skúlabrúk. Í sambandi við skúlabrúk eru 13 smærri hefti útgivin, ið taka støði í at arbeiða við tølum í árbókini.

Kaga vit á nakrar av teimum mongu síðunum, so kunnu vit millum annað nevna, at hin 1. januar 2004 vóru 2.665 fólk við eftirnavninum Joensen í Føroyum, og tað er sostatt tað mest vanliga eftirnavnið í Føroyum. Hans og Anna eru mest vanligu fólkanøvnini. Fyri fólk, sum á fyrsta sinni sóu dagsins ljós í 2003, vísir tað seg at vera somu nøvn, sum eru best umtókt. Ein orsøk er sjálvandi, at nøvnini ofta eru lið í tvínavni. Føroyskum foreldrum dámdi eisini væl í fjør at kalla síni børn Jónas, Martin og Rebekka.

Eisini sæst at lesa í nýggju árbókini, at munandi færri fólk fluttu til Føroya í fjør. Í 2003 fluttu 1.550 fólk til Føroya og 1.321 fluttu úr Føroyum. Tað merkir, at nettotilflytingin var 229 fólk Hetta er tann lægsta nettotilflytingin síðani 1997 og ein 47% afturgongd síðani í fjør. Fráflytingin hevur verið rættiliga støðug seinastu fýra árini, men tilflytingin minkaði við 189 fólkum í fjør í mun til 2002.

Tað er Føroya skúlabókagrunnur, ið gevur árbókina út, í samstarvi við Hagstovu Føroya. Ingi Joensen hevur gjørt permumyndina. Hestprent hevur umbrotið og prentað.




*Árbók fyri Føroyar 2004 er almenna-hagtalsverkið fyri Føroyar og er júst útkomið*








## Trygg á leiðini

Lívið er ljóst og vakurt. Brádliga hendir tað, og alt broytist.

Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Tryggingin tekur hond um tað dýrabarasta vit eiga.

Hjá børnum fevnir tryggingin eisini um ymiskar barnasjúkur.

Tú kanst tryggja teg alt samdøgrið ella í frítíðini.

Tryggingin kann nýtast aðrastaðni enn í Føroyum. Tú kanst fara út í allan heim við henni.

Velur tú eina vanlukkutrygging, kunnu vit hjálpa tær fíggjarliga. Tryggingin er eitt trygdarnet fyri teg og alla familjuna, og ein íløga í framtíðina.

Ring til okkara á tel 345600 ella far inn á www.trygging.fo og fá nærri at vita, hvussu vit kunnu hjálpa tær.

www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari